UTTANRÍKIS- OG FISKIMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs and Fisheries

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

23. juni 2026
Mál: 26/15375-2
(at tilskila í svari)

**Svar til fyrispurning nr. 52-121/2025 frá Fróða Magnussen, løgtingsmanni, settur Bárði á Steig Nielsen, landsstýrismanni í uttanríkis- og fiskivinnumálum, um manglandi fiskidagar í bólki 5**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir fiskidagar eru brúktir í bólki 5A og 5B í 2026?
2. Hvussu nógvir fiskidagar eru eftir í bólki 5A og 5B í árinum 2026?
3. Hvussu nógvar avreiðingar í 2025 høvdu eina vekt, sum var undir 150 kilo, og hvat svara hettar til í fiskidøgum?
4. Hvussu nógvar avreiðingar higartil í 2026 hava eina vekt, sum var undir 150 kilo, og hvat svara hettar til í fiskidøgum?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at innføra eitt minsta mark fyri, nær ein avreiðing telur við?
6. Eru ætlanir um at geva bólki 5 fleiri fiskidagar, ella seta í verk skipan, soleiðis at smærri avreiðingar ikki telja við?

**Svar til spurning 1 og 2**
Yvirlitið niðanfyri vísir, hvussu nógvir av tillutaðu fiskidøgunum í bólki 5 A og bólki 5 B eru brúktir í hvørjum bólki higartil í 2026, og hvussu nógvir fiskidagar eru eftir.

| | Bólkur 5 A | Bólkur 5 B |
|---|---|---|
| Tillutað sum felags fiskidagar í 2026 | 3.124 | 3.344 |
| Brúktir fiskidagar (uppgjørt 23.06.2026) | 1.508 | 2.561 |
| Fiskidagar eftir 23.06.2026 | 1.616 | 783 |

**Svar til spurning 3 og 4**
Yvirlitið niðanfyri vísir, hvussu nógvar avreiðingar hjá bátum í bólki 5 A og 5 B í 2025 og higartil í 2026 eru undir 150 kilo.

| | **2025** | **2026** (10.06) |
|---|---|---|
| Bólkur 5 A | 91 | 37 |
| Bólkur 5 B | 561 | 336 |
| Bólkur 5 samanlagt | 652 | 373 |

Sambært sjófeingislógini telur hvør avreiðing hjá fiskiførum í bólki 5 ein fiskidag, eisini tá túrurin er longri enn 24 tímar. Tá dagabrúkið verður gjørt upp, telur hvør avreiðing sostatt ein fiskidag.

**Svar til spurning 5 og 6**
Við gongdini higartil í ár, og við royndunum frá 2025, er ikki óhugsandi, at tøku fiskidagarnir í bólki 5 verða uppi, áðrenn fiskiársársenda. Eg fylgi við, hvussu gongdin er við dagabrúkinum. Við verandi gongd koma dagar at mangla, fyri at fiskiskapur kann halda fram alt árið.

Ein eftirmeting av skipanini við fiskidøgum fyri henda bólk er í gongd, har millum annað spurningurin um, hvørt smærri avreiðingar skulu telja við, tá fiskidagar verða gjørdir upp, eisini verður viðgjørdur.

Í arbeiðinum verður miðað eftir at menna eina skipan, sum m.a. leggur skipanina fyri bólk 5 í eina legu, sum tryggjar fiskidagar til tey, sum liva av útróðri, og sum leggur upp fyri, at bólkur 5 er ein samansettur bólkur, har nógv virksemi er, tá ið fiskur er at fáa, og stórur munur annars er á, hvussu virknir bátarnir eru.

Skipanin skal samstundis tryggja, at vit gagnnýta tilfeingið burðardygt og harundir forða fyri, at ov nógvur smáur fiskur kemur upp á land, sí annars hjálagda fylgiskjal, sum vísir støddarbýtið av toskaveiðuni í 2025.

Nú fiskiskapurin er góður, og skipanin verður eftirmett, ætlar landsstýrismaðurin at lata fleiri dagar til bólkin í inniverandi ári.

**Bárður á Steig Nielsen**
landsstýrismaður

UTTANRÍKIS- OG FISKIMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Foreign Affairs and Fisheries

Fylgiskjal

## Støddarbýti av toskaveiðuni við Føroyar í 2025
## (Undantikið línuskip (bólkur 3) og garnaskip)[1]

### Talva 1

| VEKT | Vekt, kilo | | 2 | 4 T | 4 | 5 | Allir bólkar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7,0+ | Toskur | 1 | 197.744 | 54.715 | 179.328 | 175.327 | |
| 4,0-7,0 | Toskur | 2 | 1.359.748 | 444.112 | 112.505 | 454.213 | |
| 2,0-4,0 | Toskur | 3 | 786.086 | 722.720 | 253.081 | 1.463.717 | |
| 1,0-2,0 | Toskur | 4 | 268.866 | 246.230 | 242.947 | 1.288.999 | |
| 0,3-1,0 | Toskur | 5 | 14.355 | 19.845 | 42.326 | 302.654 | |
| | | | | | | | |
| Samlað uttan óskilt | | | 2.626.799 | 1.487.622 | 830.187 | 3.684.910 | |
| Óskilt | | | 85.360 | 3.183 | 9.395 | 811 | |
| **Samlað kilo av toski** | | | 2.712.159 | 1.490.805 | 839.582 | 3.685.721 | 8.728.267 |

### Talva 2

| Mett tal av fiskum - toskaveiðan í 2025[2] | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kilo/tosk** | **Mett tal av fiski i hvørjum støddarbólki fyri hvønn skipabólk** | | | | | |
| **Bólkur** | | | **2** | **4T** | **4** | **5** |
| 8,00 | Toskur | 1 | 24.718 | 6.839 | 22.416 | 21.916 |
| 5,50 | Toskur | 2 | 247.227 | 80.748 | 20.455 | 82.584 |
| 3,00 | Toskur | 3 | 262.029 | 240.907 | 84.360 | 487.906 |
| 1,50 | Toskur | 4 | 179.244 | 164.153 | 161.965 | 859.333 |
| 0,80 | Toskur | 5 | 17.944 | 24.806 | 52.908 | 378.318 |
| Samlað tal av toski (óskilt ikki roknað við) | | | 731.161 | 517.453 | 342.104 | 1.830.056 |

[1] Støddarbólkarnir fyri fiskin eru ásettir í kruvdari verk, sløgdur fiskur við høvdi. Veiðan hjá línuskipum (bólki 3) og garnaskipum er ikki tikin við, tí sera stór nøgd hjá hesum bólkum er skrásett sum óskildur fiskur. Mett verður tí ikki, at hesin fiskur kann geva eina rættvísandi mynd við atliti at støddarbýti.

[2] Umrokningin frá vekt í støddarbólkum til tal í støddarbólkum er gjørd í einari meting, og fyrivarni skal takast fyri hesum. Sum sæst í talvu 2, so er toskur 1 mettur at viga 8 kg í meðal, toskur 5 er mettur at viga 0,8 kg í meðal. Meðalvektin fyri fiskin í hinum støddarbólkunum er mett at vera vektin á miðjuni í tí spenni, sum støddarbólkurin umboðar. Dømi, toskur 3 vigar 2,0 til 4,0 kg. Í umrokningini verður 3,0 kg brúkt.